KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 24.11.2022 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
**Nevndarlimir:** Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Símun á Høvdanum, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
**Varalimir:** Sven Dahl møtti fyri Jógvan Skorheim, og Rógvi Jacobsen møtti fyri Anniku S. Biskopstø
**Ikki møtt:**
**Onnur:** Rúni Rasmussen, kommunustjóri
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 104/22 | 22/00124-17 | Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Jógvan Skorheim |
| 105/22 | 22/01408-45 | Fíggjarætlan 2023, Klaksvíkar Býráð - *seinna viðgerð* |
| 106/22 | 22/01934-2 | Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring nov. 2022 ísv. stjóraskifti (vinnu- og mentanarstjóri) |
| 107/22 | 21/01949-2 | Serstøk byggisamtykt fyri A9 |
| 108/22 | 22/01844-3 | Marknaumskipan millum matr.nr. 208 og 210 |
| 109/22 | 22/01198-5 | Marknaumskipan, matr.nr. 738a, 650a og 1650a |
| 110/22 | 22/01887-1 | Framhald og dagføring av leigusáttmála – Gloym meg ei í gl. Norðoya Banka |
| 111/22* | 22/00748-17 | Ung í arbeiði – víðari skipan |
| 112/22 | 22/00584-39 | Nýgerð av elsta partinum, Fjallafípan - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 113/22 | 22/01671-3 | Rokning frá Landsverki viðv. burturbeining av eyri og mold av tunnilsvegi í Árnafirði – *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 114/22 | 22/00549-77 | Jústabrekka 1, støðutakan til tilboð |

*Málið flutt til viðgerð áðrenn mál 105/22 (*22/01408-45 Fíggjarætlan 2023*)

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Til viðgerðar**

## 104/22
## 22/00124-17 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Jógvan Skorheim

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 104/22 |

**22/00124-17 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Jógvan Skorheim**

**Frágreiðing um málið:**
Jógvan Skorheim, býráðslimur, hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 24. nov. 2022. Næstvaldi á listanum hevur eisini forfall. Triðvalda á listanum er Beinta Klakstein.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 18

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata viðkomandi taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Jógvan Skorheim.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
Einmælt samtykt at lata Sven Dahl og Rógva Jacobsen taka sæti í býráðnum til fundin.

## *111/22
## 22/00748-17 Ung í arbeiði – víðari skipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 15.11.2022 | 55/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 111/22 |

**22/00748-17 Ung í arbeiði – víðari skipan**

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini 3. nov. 2022 verður greitt gjøllari frá málinum.

Í stuttum snýr málið seg um, at álagt varð umsitingini saman við nevndarformonnum og -kvinnum at gera sparingar í rakstrinum í 2023. Mett verður, at tá so stórar sparingar skulu gerast, slepst ikki undan at niðurleggja onkrar funktiónir. Innan trivnaðarøkið eru ikki nógvir møguleikar fyri at niðurleggja heilar funktiónir ella rakstrarstøð, men um tað skal koma upp á tal, so er verkætlanin “Ung í Arbeiði” ein av fáum møguleikum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Játtanin í inniverandi ári til Ung í Arbeiði er samanløgd 590.000 kr., harav bókaða nýtslan pr. dags dato er 364.358, svarandi til smá 75%

Av játtanini fara árliga 246.000 kr. til løn av samskiparanum, og verður tí mælt til, at helmingurin av hesi játtan, 120.000 kr., verða lagdar oman á játtanina til Húsið í 2023, so samskiparin kann fara aftur í starv sítt hjá Húsinum, galdandi frá 01-01-2023. Talan verður sostatt um eina øking av játtanini har bara í 2023, so Húsið fær komandi ár (2023) til at tillaga sítt starvsfólkatal aftur.

Tvs. at fíggjarligu avleiðingarnar (sparingarnar) av hesi umlegging eru:
–590.000 kr. verða spardar av játtanini til Ung í Arbeiði, sum verður niðurlagt pr. 31-12-2022
+120.000 kr. verða brúktar sum "bremsulongd" til at økja játtanina til Húsið í eitt ár fram, bara í 2023
–470.000 kr. verður netto sparingin í 2023 av hesi niðurlegging og 590.000 kr. heilárliga eftir tað

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til at niðurleggja tiltakið Ung í Arbeiði pr. 31-12-2022 eftir tí í hesum tilmæli útgreinaða leisti, og at samskiparin fær boðið uppruna starv sítt í Húsinum.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 15. november 2022:**
Ein meirluti, EÓP, ASB, JC og TJL taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 03.11.22, og at tiltakið Ung í Arbeiði verður tikið upp aftur í samband við fíggjarætlanin 2024.
Ein minniluti, JS, tekur ikki undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 03.11.22.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
*Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá B&U 15. nov. 2022; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, SáH, OáL, JCC, EÓP, RJ, ÓML og TJL) og 1 atkvøðu ímóti (SD).

# 105/22
# 22/01408-45 Fíggjarætlan 2023, Klaksvíkar Býráð - *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.11.2022 | 89/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 105/22 |

**22/01408-45 Fíggjarætlan 2023, Klaksvíkar Býráð - seinna viðgerð**

**Frágreiðing um málið:**
Hervið verður uppskot til fíggjarætlan 2023 lagt fyri fíggjarnevnd og Klaksvíkar Býráð til viðgerð og støðutakan.

Á temafundinum hin 17. november um íløgupartin varð samtykt at seta íløgurnar til 51,7 mió. kr. og at hækka felagsskattainntøkurnar 1 mió. kr.

Nýggja metingin hjá Taks av inntøkunum ísbv. eldraøkið (eftirlønarskattur, DIS og FAS) er hækkað ávikavist 22 tkr. og 562 tkr., og tí verður persónsskatturin lækkaður samsvarandi.

Við hesum er úrslitið áðrenn íløgur 62,1 mió. kr. og eftir íløgur avlop upp á 10,4 mió. kr.

Samtykt var eisini at seta 10 mió. kr. til avdráttir.

Uppskotið javnvigar sostatt við 400 tkr.

| Rakstrarstað | Dagført budget 2022 | Æ2023 - 3. uppskot | Broytingar 17.11.2022 | Æ2023 - 4. uppskot | Munur Æ2022 og Æ2023 | Broyting pct |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 310.000.000 | 327.876.000 | 1.000.000 | 328.876.000 | 18.876.000 | 6,1 |
| Rakstur | 242.976.000 | 254.497.922 | 0 | 254.497.922 | 11.521.922 | 4,7 |
| | 67.024.000 | 73.378.078 | 1.000.000 | 74.378.078 | 7.354.078 | 1,3 |
| | | | | | | |
| Rentur og rentustuðul | 8.000.000 | 12.200.000 | 0 | 12.200.000 | 4.200.000 | 52,5 |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **59.024.000** | **61.178.078** | **1.000.000** | **62.178.078** | **3.154.078** | **5,3** |
| | | | | | | |
| Íløgur | | | | 51.700.000 | | |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avdráttir** | | | | **10.478.078** | | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| Lyklatøl: | | | | | | |
| Lutfall rakstur/inntøkur | 78,4 | 77,6 | | 77,4 | | |
| Lutfall rakst+rentur/inntøkur | 81,0 | 81,3 | | 81,1 | | |

Inntøkurnar tilsamans eru mettar til 328,7 mió. kr. og raksturin 254,4 mió. kr. Hetta er ein hækking upp á ávikavist 6,1% og 4,7% í mun til fíggjarætlanina 2022.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

| Rakstrarstað | Meting 2022 (17-11-2022) | Æ2023 - 3. uppskot | Broytingar 17.11.2022 | Æ2023 - 4. uppskot | Munur Æ2022 og Æ2023 | Broyting pct |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | -237.731 | -246.196 | 584 | -245.612 | -7.881 | 3,3 |
| Felagsskattur | -18.218 | -20.500 | -1.000 | -21.500 | -3.282 | 18,0 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | -47.195 | -50.763 | -22 | -50.785 | -3.590 | 7,6 |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | -10.945 | -10.417 | -562 | -10.979 | -34 | 0,3 |
| Skattainntøkur | -314.090 | -327.876 | -1.000 | -328.876 | -14.786 | 4,7 |

Rakstur býttur á greinar:

| Rakstrarstað | Dagført budget 2022 | Æ2023 - 3. uppskot | Broytingar 17.11.2022 | Æ2023 - 4. uppskot | Munur Æ2022 og Æ2023 | Broyting pct |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunufyrisiting | 25.240 | 26.063 | 0 | 26.063 | 823 | 3,3 |
| Almanna- og heilsumál | 91.044 | 95.913 | 0 | 95.913 | 4.869 | 5,3 |
| Børn og ung | 51.010 | 55.648 | 0 | 55.648 | 4.638 | 9,1 |
| Undirvísing | 13.189 | 14.189 | 0 | 14.189 | 1.000 | 7,6 |
| Mentan og frítíð | 16.400 | 18.037 | 0 | 18.037 | 1.637 | 10,0 |
| Teknisk mál | 26.700 | 26.825 | 0 | 26.825 | 125 | 0,5 |
| Kommunal virki | 19.393 | 18.223 | 0 | 18.223 | -1.170 | -6,0 |
| | 242.976 | 254.898 | 0 | 254.898 | 11.922 | 4,9 |

Rentustuðul og rentur av lánum eru mett til 12,2 mió. kr.

Her er útgreining av íløgunum, sum vórðu samtyktar á felags nevndarfundinum 17. november:

| | |
|---|---|
| Nýgerð av Fjallafípuni | 4.600.000 |
| Útiøki á Skúlatrøð | 3.600.000 |
| Klokkuskipan á Skúlatrø | 490.000 |
| Bókasavn (rúmið) | 330.000 |
| Mentanarhúsið | 3.000.000 |
| Hornaskýlið | 2.000.000 |
| Fastogn | 2.000.000 |
| Byggibúning miðbýur (uttanumøkið kappr neyst) | 3.000.000 |
| Byggibúning á Fossum | 10.000.000 |
| Spillivatnsútbygging (kloakk) | 3.500.000 |
| Vegur + parkeringspl. við Stangavegin ("Kongaríkið") | 3.000.000 |
| Vegir íløga | 4.000.000 |
| Víðkan av øki í Norðhavnini | 8.500.000 |
| Bátafelagshús og sølutorg | 500.000 |
| Vatnleiðing til tunnil Norður um Fjall | 530.000 |
| Byggibúning bústaðir | 1.500.000 |
| Prosjektering av Gregoriusen bygningi | 500.000 |
| Fimleikarahøll, fyrireiking | 450.000 |
| Skiljiskipan - reinhald og burturkast | 100.000 |
| Fyrireiking til tak omaná svimjihylin úti í Grøv | 100.000 |
| | |
| | **51.700.000** |

Sum kunnugt, er skuldin hjá kommununi oman fyri eina álíkning. Fíggjarmálaráðið hevur í skrivi,

dagfest 30. august 2021, boðað Klaksvíkar kommunu frá, at góðkenning til lántøku verður gingin á møti við teirri treyt, at kommunan í seinasta lagi í fíggjarárinum 2024 kemur undir skuldarmarkið aftur.

Neyðugt er at seta pening av til avdráttir. Í verandi uppskoti er avlopið eftir íløgur 10,4 mió. kr.

Hetta er áleið 6 mió.kr. minni enn avdráttirnir í verandi lániavtalum, og tí verður neyðugt at fíggja upphæddina við lántøku (umfígging).

Treytað av, at hallið í ár verður 50 mió. kr., verður nettoskuldin við ársenda 71 mió. kr. oman fyri loyvda skuldarmarkið.

Við 10 mió. kr. í avdráttum og hækking í persónsskattinum verður nettoskuldin ultimo 2023 á leið 52 mió. kr. oman fyri skuldarmarkið.

Hetta merkir, at tað verður trupult at koma undir skuldarloftið í 2024.

Í ólavsøkurøðu løgmans 2022 varð boðað frá, at landsstýrið arbeiddi við lógaruppskoti at hækka skuldarloftið hjá kommununum. Hetta hevur Kommunufelagið fleiri ferðir mælt til. Væntað verður, at nýtt landsstýri fer at arbeiða fyri at hækka skuldarmarkið. Á fundi við Fíggjarmálaráðið í summar varð upplýst, at fyri Klaksvíkar kommunu fer hetta at merkja, at loftið hækkar einar 20 mió. kr. Um lógarbroyting verður samtykt, verður nettoskuldin við ársenda 2024 – við fortreytunum omanfyri – á 10 mió. kr. oman fyri álíkningina.

Støða skal eisini takast til ásetan av skattaprosenti og barnafrádrátti. Hesi eru í dag 20,75% og kr. 5.500.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verandi uppskot vísir 10,4 mió. kr. í avlopi áðrenn avdráttir. Við 10 mió. kr. í avdráttum verður úrslitið 400 tkr.
Verandi lániavtalur siga, at rindast skulu áleið 16 mió. kr. í avdráttum. Tí verður neyðugt við umfígging í 2023.

**Tilmæli:**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri 2023 omanfyri verður lagt fyri fíggjarnevnd og Býráð til viðgerð og støðutakan. Skattaprosent og barnafrádráttur skal eisini ásetast.

Fyrisitingin mælir til, at í minsta lagi 14 mió kr. verða settar av til avdráttir í 2023, vísandi til tilmælið til temafund II um íløgupartin, sum varð hildin 17. november.

**Fíggjarnevndin 22. november 2022:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 18-11-2022.
Ein minniluti, JS og TJL, mælir til at hækka inntøkurnar av sølu av lendi (á Fossum) við 2 mió. kr. og seta 2 mió. kr. av til byggibúning miðbýur (uttanumøki til hotell).
JS mælir haraftrat til, at Ung í Arbeiði heldur fram.

**Oddmar á Lakjuni fór av fundinum kl. 18:25**

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**

Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá JS og TJL í FíN 22. nov. 2022 (hækka inntøkur við 2 mió. kr. og seta 2 mió. kr. av til byggibúning miðbýur, uttanumøki til hotell); tað fall við 4 atkvøðum fyri (ÓML, SVJ, TJL og SD) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, SáH, JCC, EÓP og RJ).

Síðani varð atkvøtt um tilmælið, dagf. 18. nov. 2022; tað varð einmælt samtykt.

Sostatt er fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2023 samtykt við hesum tølum:

**Klaksvíkar kommuna, fíggjarætlan 2023**

| | | tkr. |
|---|---|---|
| | Inntøkur | 328.876 |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 26.063 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 95.913 |
| §3 | Børn og ung | 55.648 |
| §4 | Útbúgving og gransking | 14.189 |
| §5 | Mentan og frítíð | 18.037 |
| §6 | Teknisk mál | 26.825 |
| §7 | Kommunalt virki | 18.223 |
| | **Rakstrarútreiðslur** | 254.898 |
| | **Rakstraravlop** | **73.978** |
| | Rentustuðul | 4.000 |
| | Rentur | 8.200 |
| | | 12.200 |
| | Úrslit áðrenn íløgur | 61.778 |
| | Íløgur | 51.700 |
| | **Úrslit áðrenn avdráttir** | 10.078 |
| | Avdráttir | 10.000 |
| | **Úrslit** | **78** |

| **Útgreining (íløgur)** | **tkr.** |
|---|---|
| Nýgerð av Fjallafípuni | 4.600 |
| Útiøki á Skúlatrøð | 3.600 |
| Klokkuskipan á Skúlatrøð | 490 |
| Bókasavnið (Rúmið) | 330 |
| Mentanarhúsið (Varpið) | 3.000 |
| Hornaskýlið | 2.000 |
| Fastogn | 2.000 |
| Byggibúning miðbýur (uttanumøki kappróðrarneyst) | 3.000 |
| Byggibúning á Fossum | 10.000 |
| Spillivatnsútbygging (kloakk) | 3.500 |
| Vegur og parkeringsøki við Stangavegin ("Kongaríkið") | 3.000 |
| Vegir íløga | 4.000 |
| Víðkan av øki í Norðhavnini | 8.500 |
| Bátafelagshús og sølutorg | 500 |
| Vatnleiðing til tunnil Norður um Fjall | 530 |
| Byggibúning bústaðir | 1.500 |
| Prosjektering av Gregoriussen bygningi (Skúlatrøð) | 500 |
| Fimleikarahøll, fyrireiking | 450 |
| Skiljiskipan - reinhald og burturkast | 100 |
| Fyrireiking til tak omaná svimjihylin úti í Grøv | 100 |
| Tilsamans | 51.700 |

Harumframt varð einmælt samtykt at taka undir við einum **skattaprosenti** upp á **20,75 %** og einum **barnafrádrátti** upp á **5.500 kr.**

## 106/22
## 22/01934-2 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring nov. 2022 ísv. stjóraskifti (vinnu- og mentanarstjóri)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.11.2022 | 90/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 106/22 |

**22/01934-2 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring nov. 2022 ísv. stjóraskifti (vinnu- og mentanarstjóri)**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við at nýggjur vinnu- og mentanarstjóri hevur tikið við, skal reglugerðin um fulltrú til kommunalar bindingar dagførast.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin § 44, stk. 2: ”*skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess*”. Sambært viðmerking til omanfyrinevndu lógargrein “*skal kommunustýrið tilnevna persónliga og við navns nevni medundirskrivaran hjá borgarstjóranum. Starvsheitið er ikki nøktandi*”.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við dagførdu reglugerðini.

**Fíggjarnevndin 22. november 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-11-2022.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
Tilmælið frá FíN 22. nov. 2022 einmælt samtykt.

## 107/22
## 21/01949-2 Serstøk byggisamtykt fyri A9

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 14.11.2022 | 149/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 15.11.2022 | 67/22 |
| 3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 15.11.2022 | 39/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 107/22 |

**21/01949-2 Serstøk byggisamtykt fyri A9**

**Frágreiðing um málið:**
Greitt verður eitt sindur nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini 7. nov. 2022.

Arbeitt verður við ætlan um nýggjan eldradepil fyri Norðoyggjar, og eftir áheitan frá borgarstjóranum og stjóranum í NBH hevur fyrisitingin og ráðgevar kannað, hvørjir møguleikar eru at staðseta ein eldradepil á Gravarbø.

Klaksvíkar býráð hevur frammanundan í sep. 2020 samtykt eina serstaka byggsamtykt fyri umtalaða økið. Almenna hoyringin hevur ikki verið, tí tað vóru ivamál um summar ásetingar, men hetta hevur man síðani fingið staðfest er í tráð við BK17. Samstundis sum hetta verður kannað, kemur røringur í um eldraepil. Tí kom steðgur í, og almenn hoyring hevur ikki verið.




*Uppskotið til serstaka byggisamtykt A9 – Gravarbø / Samtykt sep. 2020.*

Lendið heimanfyri viðarlundina er landsjørð. Fundur hevur verið við festararnar fyri at hoyra teirra hugsan um at útleggja stóran part av lendinum til alment endamál og møguliga ætlanini um at sleppa samtyktini um serstaka byggisamtykt fyri A9.

Býarplansbólkurin hevur síðani viðgjørt fyrispurningin um staðseting, og hevur hann hesar viðmerkingar og uppskot til møguliga skipan av økinum:

1) Heimasti bøurin matr.nr. 759a og 761a verður nýtt D-øki, fríøki.
2) Matr.nr. 961a verður útlagdur til C-øki til alment endamál.
3) Nýtt A-øki sum hevur somu ásetingar sum A10, blandað íbúðar- og vinnuendamál. Fevnir um verandi sethús og pláss fyri uml. tveimum grundstykkjum aftrat.
4) Nýtt A-øki sum er ætlað til eldraíbúðir (D). Ynski er, at byggingin verður sum stakbygningar ella tvíhús, so at tað verður frírúm millum húsini, tað vísir fyrilit fyri útsýni og vindi.
5) Røktarheimið verður staðsett á matr.nr. 1618. Økið er líka yvir 1 ha. Dentur verður lagdur á, at byggingin fellur væl inn í lendið.
6) Hildið verður fast við upprunaætlanina um at útleggja økið til alment endamál, so sum skótavirksemi. Talan er uml. 700 m$^2$.
7) Økið omanfyri landsvegin verður útlagt sum A-øki við somu ásetingum sum A10.




*Uppskot - Skipan av Gravarbø*

Um samtykt verður at arbeiða víðari við omanfyri nevnda uppskoti, framleggur fyrisitingin uppskot til ásetingarbløð til eitt av komandi nevndarumførunum.
Aftrat tí skulu samráðingar verða við Landsverk um íbinding í landsveg, og uppskotið skal eisini leggjast fyri Friðingarmyndugleikan og Skógfriðingarnevndina. Til viðgerðina hjá skóg- og friðingarnevndunum verður neyðugt at framleiða neyðugt tilfar, ið lýsir ætlaðu bygging. Her verður serliga hugsað um vavið á eldradeplinum og uttanumøkið.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m
Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu
Friðingarmyndugleikin og Skógfriðingarnevndin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Keyp av lendi verður ikki viðgjørt á hesum sinni.
Ráðgevarakostnaður verður fíggjaður av NBH.

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri nevnd og býráð til støðutakan; um kommunan skal sleppa samtyktu serstøku byggisamtykt fyri A9 og loyva fyrisitingini at arbeiða víðari við nýggja uppskotinum, ið tekur støði í omanfyri lýsa uppskoti.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. november 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-11-2022, at sleppa serstøku byggisamtyktini fyri A9 og loyva fyrisitingini at arbeiða víðari við nýggja uppskotinum, ið tekur støði í tí í tilmælinum lýsa uppskoti.

**Mentanarnevndin 15. november 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 14.11.2022.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 15. november 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 15.11.22.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
Tilmælið frá E&B 15. nov. 2022 einmælt samtykt.

## 108/22
## 22/01844-3 Marknaumskipan millum matr.nr. 208 og 210

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 14.11.2022 | 148/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 108/22 |

**22/01844-3 Marknaumskipan millum matr.nr. 208 og 210**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umsøkta marknaumskipan millum matr.nr. 208 og 210 í Klaksvík.
Grundað á sølu av matr.nr. 210 ynskir eigarin allan hjallin og stoypta plattin matrikuleraðan uppí matr.nr. 208.




**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert tilmælandi

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. november 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-11-2022.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
Tilmælið frá UBN 14. nov. 2022 einmælt samtykt.

## 109/22
## 22/01198-5 Marknaumskipan, matr.nr. 738a, 650a og 1650a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 14.11.2022 | 150/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 109/22 |

**22/01198-5 Byggiloyvi til rætt og marknaumskipan**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við útstykkingina á Fossum verður neyðugt at taka rættina við tyrlupallin niður, tí reinsiverkið skal staðsetast har. RTS, sum er arbeiðstakari fyri útstykkingina á Fossum, hevur givið tilboð uppá at taka verandi rætt niður og byggja nýggja rætt í nýggju innleggingini í Uppsalahaga.

Tekniska fyrisiting hevur samskift við Hagastýrið fyri Uppsalahaga fyri at koma fram til eina hóskandi loysn til nýggja rætt. Í hesum samskiftinum hevur hagastýrið somuleiðis skotið upp at fremja eina marknaumskipan millum hesar matriklar: matr.nr. 738a, 650a og 1650a (felag ogn). Eigararnir av matr.nr. 738a og 650a hava latið váttan. Matr.nr. 650a fær tinglýsta atkomu ígjøgnum matr.nr. 1650a (felags ogn). (sí *Nýggir matr. - rev.04.11.22* og *Váttan um marknaumskipan 21.06.22*)




*Frá vinstru uppskot til marknaumskipan. Verandi matriklar til høgru (lutfallið er ikki eins á myndunum).*

**Lógargrundarlag:**
Matrikulógin
Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Niðurtøka av verandi rætt og nýggj rætt verður fíggjað av verkætlanini á Fossum.
Uppsalahagi ber allan kostnað av umskipan.

**Tilmæli:**
Fyrisitingin mælir til umskipanina.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. november 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-11-2022.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
Tilmælið frá UBN 14. nov. 2022 einmælt samtykt.

## 110/22
## 22/01887-1 Framhald og dagføring av leigusáttmála – Gloym meg ei í gl. Norðoya Banka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 14.11.2022 | 156/22 |
| 2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 15.11.2022 | 59/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.11.2022 | 93/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 110/22 |

**22/01887-1 Framhald og dagføring av leigusáttmála – Gloym meg ei í gl. Norðoya Banka**

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini 3. nov. 2022 verður greitt eitt sindur gjøllari frá málinum.

Í stuttum snýr málið seg um støðutakan til framhald og dagføring av leigusáttmála millum Almannaverkið og kommununa um hýsing av landsstovninum Gloym meg ei í gamla Norðoya Banka. Orsøkin til tørvin á at endurskoða leigumálið eru nevndarsamtyktirnar frá juni 2022, har avvarðandi nevndir samtyktu at flyta virkishúsið fyri ung, Húsið, aftur undir eina lon í gamla Norðoya Banka, tó við tí treyt, at ein nøktandi loysn varð funnin fyri Gloym meg ei í øðrum hóskandi hølum í býnum.

**Lógargrundarlag:**
Talan er um ein kommunalan bygning, sum kommunan leigar út til eitt almannagagnligt endamál fyri eina marknaðargrundaða leigu. Kommunan útvegar sær sostatt – upp á sikt – eina nøktandi inntøku av ognini og livir harvið upp til yvirskipaða endamálið í kommunustýrislógini um, at kommunan skal umsita sínar ognir og virðir á ein fullgóðan og tryggan hátt.

Landsalmenna virksemið, sum flytir inn í bygningin, verður veitt øllum borgarum í viðkomandi málbólki, tvs. talan er um almannagagnligt virksemi, sum við hesum leigumáli flytir í kommununa og harvið kemur nærri viðkomandi borgarum her í kommununi.

Sostatt er – bæði í mun til tað fíggjarliga, ognarumsiting og tænastuna til borgararnar í kommununi – talan um ein eina skilagóða verkætlan, sum ikki er í stríð við nakra lóggávu.

Umframt Trivnaðarnevndina børn og ung verður málið lagt fyri Umhvørvis- og býarskipanarnevndina, Fíggjarnevndina og býráðið. Orsøkin til viðgerðina í UBN er tann, at § 27, 4. petti, í kommunustýrisskipanini ásetur viðvíkjandi UBN, at “*nevndin fyrisitur kommunalu teknisku málsøkini, sum t.d. fastognir (fríðkan og viðlíkahald av øllum bygningum) ...*”

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Hækking av leiguinntøkuni fyri gamla Norðoya Banka:

| | Kvm. | Pr. kvm. | Upphædd pr. ár | Upphædd pr. mánað |
|---|---|---|---|---|
| Verandi leiga: | 350 | 680 | 238.000 kr. | 19.833 kr. |
| Dagførd leiga: | 350 | 1.100 | 385.000 kr. | 32.083 kr. |
| **Tvs. meir-leiguinntøka heilárliga:** | | | **+147.000 kr.** | **+12.250 kr.** |
| **Gildiskoma 01-06-2023, tvs. meirinnt. 2023 er:** | | | **+85.750 kr.** | |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til, at kommunan leingir leigusáttmálan við Almannaverkið um gamla Norðoya Banka við í minsta lagi 10 árum við teimum í hesum tilmæli upplýstu leiguprísum – hetta tó treytað av, at ein nøktandi hølisloysn fyri Húsið undir einari lon verður funnin aðrastaðni í Klaksvík.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. november 2022:**
OáL og SáH taka undir við tilmælinum, dagf. 03-11-2022, men at leigusáttmálin verður 5 ár og prístalsreguleraður á hvørjum ári.
ASB og SVJ taka støðu í býráðnum.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 15. november 2022:**
Ein meirluti, TJL, JS, EYÓP, tekur undir við meirlutanum í UBN dagfest 14.11.22. Heitt verður á umsitingina um at gera alt fyri, at Húsið fær eina betri og varandi loysn.
ASB og JC taka støðu í býráðnum.

**Fíggjarnevndin 22. november 2022:**
Nevndin tekur undir við meirilutanum í B&U 15-11-2022.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá SVJ: "Mælt verður til at halda fast við samtyktina hjá FíN 28. juni 2022 (í máli 22/00992-1), og at kommunan viðvirkar til at finna eina loysn fyri Gloym meg ei"; tað fall við 2 atkvøðum fyri (JCC og SVJ) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, SáH, EÓP, RJ, ÓML og TJL). SD atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini í UBN 14. nov. og B&U 15. nov. og tilmælið frá FíN 22. nov. 2022; tey vórðu samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, SáH, EÓP, RJ, ÓML, TJL og SD) og 1 atkvøðu ímóti (JCC); SVJ atkvøddi ikki.

## *111/22
*Málið flutt til viðgerð áðrenn mál 105/22 (*22/01408-45 Fíggjarætlan 2023*)

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 112/22
## 22/00584-39 Nýgerð av elsta partinum, Fjallafípan – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 144/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 60/22 |
| 3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 18.10.2022 | 50/22 |
| 4 Havna- og Vinnunevndin | 19.10.2022 | 52/22 |
| 5 Tekniska Nevnd | 19.10.2022 | 87/22 |
| 6 Fíggjarnevndin | 25.10.2022 | 77/22 |
| 7 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 99/22 |
| 8 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 112/22 |

**22/00584-39 Nýgerð av elsta partinum, Fjallafípan - eykajáttan 2022**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. okt. 2022.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Ein meiriluti, OáL, SáH og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
SVJ tekur støðu í býráðnum.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Ein meiriluti, JCC, ASB og SáH, tekur undir við tilmælinum, dagd. 07-10-2022.
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu í býráðnum.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 18. oktober 2022:**
Ein meiriluti, JC, ASB og EÓP, tekur undir við tilmælinum, dagfest 07.10.22.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur støðu í býráðnum.

**Havna- og Vinnunevndin 19. oktober 2022:**
Ein meiriluti, ASJ, EÓP, ÓML og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
Ein minniluti, TJL, tekur støðu í býráðnum.

**Tekniska Nevnd 19. oktober 2022:**
Ein meiriluti, ASJ, EÓP, ÓML og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
Ein minniluti, TJL, tekur støðu í býráðnum.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2022:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
JS og TJL taka støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 25-10-2022; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, OáL, SáH, JCC, EÓP, ASB og ÓML), og ongari atkvøðu ímóti. JS, SVJ og TJL atkvøddu ikki.

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 27. okt. 2022; hon varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, SáH, JCC, EÓP, RJ og ÓML), og ongari atkvøðu ímóti. SVJ, TJL og SD atkvøddu ikki.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 113/22
## 22/01671-3 Rokning frá Landsverki viðv. burturbeining av eyri og mold av tunnilsvegi í Árnafirði – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 142/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 59/22 |
| 3 Havna- og Vinnunevndin | 19.10.2022 | 51/22 |
| 4 Tekniska Nevnd | 19.10.2022 | 80/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.10.2022 | 79/22 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 100/22 |
| 7 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | 113/22 |

**22/01671-3 Rokning frá Landsverki viðv. burturbeining av eyri og mold av tunnilsvegi í Árnafirði**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. okt. 2022.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022; fíggingin frá UBN verður at koma frá *Vegir til eldri sethús.*

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 17-10-2022; fíggingin 430 tkr verður tikin av játtanini (íløgur) til virksemið í Mentarnarhúsinum og Bygdarhús.

**Havna- og Vinnunevndin 19. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 18-10-2022; fíggingin 860 tkr verður tikin av játtanini (íløgur) til Sølutorg

*ASJ luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

**Tekniska Nevnd 19. oktober 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Nevndin tekur undir við HaVN 19. okt. 2022; fíggingin, 215 tkr., verður tikin av játtanini til *Vegir, íløgur.*

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Ein meiriluti, KHJ, OáL og TJL, tekur undir við UBN 17-10-2022, MeN 18-10-2022, og HaVN og TN 19-10-2022.
JS tekur støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Atkvøtt varð um sóljóðandi broytingaruppskot frá JS: "*Mælt verður til at taka upp samráðingar við byggifyritøkuna at fáa kostnaðin niður*"; tað fall við 6 atkvøðum ímóti (KHJ, OáL, SáH, JCC, EÓP og ASB) og 3 atkvøðum fyri (JS, TJL og SVJ); ÓML atkvøddi ikki.

Atkvøtt varð um tilmælini frá UBN 17-10-2022, MeN 18-10-2022, HaVN og TN 19-10-2022 og meirilutanum í FíN 25-10-2022; tey vórðu samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, OáL, SáH, JCC, EÓP, ASB, ÓML, SVJ og TJL) og 1 atkvøðu ímóti (JS).

**Klaksvíkar Býráð 24. november 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 27. okt. 2022; hon varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, SáH, JCC, EÓP, RJ, ÓML, SVJ og TJL) og ongari ímóti, SD atkvøddi ikki.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 114/22
## 22/00549-77 Jústabrekka 1, støðutakan til tilboð

Fundurin lokin kl. 20:15